FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

NVD *Rit*

SERRITGERÐ
Thesis

TØKNIFRÁGREIÐING
Technical Report

UNDIRVÍSINGARTILFAR
Teaching Material

UPPRIT
Notes

# Túrfrágreiðing

## Úrslit frá yvirlitstrolingini á Føroyabanka

## 21.- 25 mars 1997

*Cruise report: Results from the groundfish trawl survey on Faroe Bank*

*March 21$^{th}$- 25$^{th}$ 1997*

Eyðfinn Magnussen



NVD*Rit* 1997:1

NÁTTÚRUVÍSINDADEILDIN
Faculty of Science and Technology

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
University of the Faroe Islands

| | |
|---|---|
| Heiti / Title | **Úrslit frá yvirlitstrolingini á Føroyabanka 21.- 25. mars 1997** *Results from the groundfish trawl survey on Faroe Bank March 21th– 25th 1997* |
| Høvundur / Author | **Eyðfinn Magnussen** |
| Ritslag / Report Type | Tøknifrágreiðing/*Technical Report* |

NVD*Rit* 1997:1
© Náttúruvísindadeildin og høvundurin

Útgevari / Publisher Náttúruvísindadeildin, Fróðskaparsetur Føroya
Bústaður / Address Nóatún 3, FO 100 Tórshavn, Føroyar (Faroe Islands)
Postrúm / P.O. box 2109, FO 165 Argir, Føroyar (Faroe Islands)
✆ • 🖷 • @ +298 352550 • +298 352551 • nvd@setur.fo

**Fólk við frá FRS:** Kristin Zachariassen, Rógvi Mouritsen og Eyðfinn Magnussen

**Ábyrgd:** Eyðfinn Magnussen

**Endamál:** Høvuðsendamálið við túrinum var, at fáa eitt mát fyri nøgdini og biologiini, serliga vøkstri og føði, hjá teimum týdningarmestu fiskasløgunum, ið finnast á Føroyabanka. Eisini CTD, vatnprøvar til føðslusølt, djóra- og plantuæti, vórðu tikin, umframt at temperaturin varð máldur á trolinum undir tovingini.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinhamns lemmar. Breitlar 60 og 120 m, CTD og WP2 glúpur, temperatu/dýpdarmátarin neyvleiki 0,1 °C. Á túrinum varð fyri fyrstu ferð settur ein temperaturmátari á trolið. Tempoeraturmátarin mátar hita og dýpi. Mátarin varð settur á høvuðslínuna. Mátad við eitt min. millumbili. Fyrsti mátarin ið nýttur varð, kundi fara niður á 775 m dýpi., hesin var tó mistur 23/3. Eftir hettar varð ein annar mátari settur á trolið. Hesin kundi tó bert fara niður á 215 m dýpi. Neyvleikin á mátarunum var 0,1 °C fyri hitan, og ávikavist +/- 20 og 6 m fyri dýpi á teimu 2 mátarinum

**Um túrin:** Farið var av Havnini 20/3 á kl.21.00. Fyrsta hálið var á Føroyabanka 21/3 kl. 06.52. Seinasta hálið var 25/3 kl. 14.44. Túrurin samsvaraði við ætlanina, undantikið punt 1740. À hesum punti varð roynd 3 ferðir, men hvørja fer bleiv trolið fast. Áður hevur ikki verid trupulleiki vid hesum puntinum

**Prøvataking:** Á Føroyabanka vóru tiknar 28 trolstøðir: Á túrinum vórðu hesir magar tiknir:

| Fiskaslag | Tal |
|---|---|
| Toskur | 128 |
| Hýsa | 106 |
| Upsi | 81 |
| Brosma | 5 |
| Gulllaksur | 20 |
| Glýsufiskur | 13 |
| Kalvi | 1 |
| Havtaska | 2 |
| Mathøgguslokkur | 11 |
| Havmús | 20 |
| Tilsamans | 387 |

Tal av nytrum tiknar á túrinum:

| Fiskaslag | Tal |
|---|---|
| Toskur | 287 |
| Hýsa | 296 |
| Upsi | 195 |
| Gulllaksur | 20 |
| Kalvi | 1 |
| Brosma | 5 |
| Havtaska | 3 |
| Glýsufiskur | 13 |
| Tilsamans | 820 |

Á Føroyabanka vóru tiknar 12 CTD, WP-glúp og vatnprøvar.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Nytrarnar verða stoypta og lisnar skjótast gjørligt. Magainnihaldið verður sorterað seinri í ár.

**Fyribils úrslit:** Á túrinum var meira fingið av smáfiski enn vanligt hevur verið tey seinastu árini. Samansetingin av teimum ymisku fiskasløgunum var eitt sindur ørvísini en vanligt hevur verid. Lítið ella einki varð til dømis fingið av kongafiski, skøtu, og knurrhana, sum annars hevur verið vanligt undanfarin ár.

**Æti:** Lítið av djóraæti var í glúpinum; frægasta støðin var nr 7.

**Hitamátingum á trolinum:** Á víðløgdu síðunum sæst hvussu hitin var undir skjóting, toving og tá ið hálað varð. Undir hvørjari mynd síggjast virðini fyri ávíkavist: miðal, standardfrávik, lægsta og hægsta mátaða temperaturin mátað við botnin meðan tovað varð. Á *mynd 1* eru miðalvirðini fyri hvørt tov.

**Toknutrøll:** Á túrinum var eisini hugt eftir toknutrøllum hjá toskinum á Føroyabanka, men einki varð funnið. Á túrunum frammanundan varð sama kanning gjørd av toskinum á Landgrunninum, her vóru uml. 1/3 av toskinum fongdir av toknitrøllum.




***Mynd 1***: *Miðalhitin við botnin fyri hvørt tov mátaður í tíðarskeiðnum 21-23.mars 1997.*

Eyðfinn Magnussen

7. apríl 1997